






All That Rain. Frá vinstru: Hans Ravnsfjall, Finnbjørn Hansen, sum var gestatónleikari, og Pól Arni Holm

# »Ob-la-di Ob-la-da«

**Eitt sindur um eitt senda væleydnað Beatles-tiltak, sum FSV-stuðlar skipaðu fyri seinasta leygarkvøld, 17. mai**

AFTURHVARV
*Myndir: Gissur Patursson*

– Aftaná rúsin úr Parkini við Sir. Paul McCartney, kanska ein tann besta konsertin í mannaminni, varð tað við spenningi at fólk leitaðu sær til BEATLES tiltakið á Giljanesi seinasta vikuskiftið. Ikki tí tað vóru ikki so nógv fólk í tí fyrra bussinum, men túrurin byrjaði við einum sera vælhýrdum bussførara, og vit vóru ikki komin út úr Havnini, tá fólk fóru at tosa saman um hettar tiltakið, meðan vit lýddu á løg fra fløguni hjá Paul McCartney »live« back to thr world. Sera hugaligt, og tá vit steðgaðu uttanfyri har vesturi kom rættuligur Beatles rómur á okkum; so væl varð dekurerað við ljósskeltum v. m. og innkomin vóru vit væl móttikin. Inni í høllini høvdu tey sett borð upp við livandi ljósum – sera hugnaligt, ein kundi eisini keypa breyð við góðum viðskera á og ein Restorffs, um tosti kom á…

Robert McBirnie beyð vælkomin, og slapp hann bara væl frá at verða sokallaður disk jockey-frásøgumaður, og hoyrdu vit so at byrja við nøkur »cover« løg t.e. løg, sum aðrir tónleikarar hava sungið hjá Beatles.

At byrja við vóru vit bara eini 40 fólk, men tey, ið vóru, fóru beinanvegin at dansa, so stemningurin varð har við tað sama.

Tað komu so við og við fleiri fólk, og at enda mundu tað verða eini 5-600 fólk, og vóru øll sera vælhýrd, og stuttligt var eisini at hoyra at nærum øll sungu við til tey eykendu og melodiøsu løgini.

Allir bólkarini komu sera væl frá sínum uppgávum, og virkaði tað, sum teir høvdu vant væl til júst hetta tiltakið, og stuttligt varð eisini at sýggja, at teir høvdu lagt seg eftur at verða ílætnir sum Beatlarnir.

Ljóðið var gott, og tað fylti væl í høllini uttan at verða ov hart, men saknaði kanska eitt sindur av diskanti, men í síni heild ok.

Til endans sungu allir bólkarnir saman við okkum »All You Need Is Love« og varð tað rørandi, ikki minst tá so alt bleiv klappað innaftur, og finalan endaði við »Hey Jude« totalt succes!!!

Samanumtikið eitt sera sera væleydnað kvøld, har fólk gloymdu alt um verkfall o. a., og eitt kvøld, ið vit fara at minnast við leingi reint tónlistarliga – og halda vit eisini, at stuttligt hevði verið, um hettar bleiv uppafturtikið, kanska eisini skuldu vit verið ílætin sum man varð um hettar mundið. Tað hevði ikki gjørt tiltakið verri.

Á veg aftur til Havnar var bussurin nærum fullur, lagið varð gott, og øll vóru samd um eitt sera gott minniríkt kvøld, og á veg »heim« lurtaðu vit aftur eftur fløuni »back to the world« hjá Paul McCartney, nøkur av teim góðu gomlu......

Bólkarnir, ið spældu, vóru: Jákup'saskegg, Robert & Co, All That Rain, Showmenn.




Høllin á Giljanesi skrýdd til Beatles tiltakið



Robert McBirnie var frásøgumaður, men sang eisini okkurt lagið





Fyrsti bólkur á pallinum var Ják'upsaskegg



Showmenn vóru seinastir á palli og spældu eisini undir til felags framførsluna, sum endaði kvøldið



Dansurin gekk væl alt kvøldið, men tá bólkarnir endaðu við at spæla tvey løg saman, sungu allir áskoðararnir við



Møguleiki var eisini at sita og hugna sær

FÓLK TIL MÓTTØKUNA

Søkt verður eftir dugnaligum fólki til móttøkuna umborð á Norrønu.

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl danskt og enskt og annars hava kunnleika til hini norðurlendsku málini umframt týskt ella onnur fremmandamál. Tað er ein treyt, at móttøkufólkini hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið. Heilsuprógv fyri sjófólk krevst.

Smyril Line bjóðar størv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Fleiri upplýsingar fáast hjá Andriasi Joensen, manningarleiðara, á tel 34 59 00 ella 34 59 78.

Umsóknarfreistin er mánadagin 2. juni. Umsóknir og CV skulu sendast til:

Smyril Line
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn

Ella við teldupostí til:
technical@smyril-line.fo

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Bronckgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Nýggja Norrøna er 36.000 BT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".